**Heimarøktin og Serforsorgin**
**Serstovnadeildin**
**Bústovnurin og Sambýli á Rúnarvegi**
**620 Runavík**

# Pedagogur til Rúnarveg

Innan Heimarøktina og Serforsorgina, og stovnar undir tí við fyribils tænastu á Bústovninum og Sambýlinum á Rúnarvegi í Runavík, er eitt pedagogstarv leyst til setan 15. juni 2005 ella eftir nærri avtalu.

Talan er um eitt tænastumannastarv. Løn og setanartreytir vera eftir sáttmálanum millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Pedagogfelag, lønarstigini 24-33 eftir lønartalvu frá 01.10.04

Arbeiðstíðin er 40 tímar um vikuna. Arbeitt verður í skiftandi vaktum, tvs. tað eru dag, kvøld og náttarvaktir. Eisini verður arbeitt í vikuskiftum og á serstøkum halgidøgum.

**Dentur verður lagdur á, at tann sum settur verður, er áhugaður í at luttaka aktivt í øllum avbjóðingum og er opin fyri nýhugsan.**
**Harafturat er neyðugt at arbeiða sjálvstøðugt og at samstarva við onnur.**

Starvsøkið umfatar eisini Sambýlið á Líknagøtu 1 í Saltangará, ið er undir somu leiðslu sum Bústovnurin og Sambýli á Rúnarvegi. Tí kann tann setti eisini rokna við at fáa aðrar uppgávur, um tørvur gerst á hesum.

Bert umsøkjarar, sum hava lokið eina námsfrøðiliga útbúgving vera settir í starv.

Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til leiðaran á tlf. 226121.
Umsóknarfreistin er 10. juni kl. 12.00 2005 og skulu umsóknirnar sendast til:

**Bústovnin á Rúnarvegi**
Att: Leiðarin
Rúnarvegur 6
Fo - 620 Runavík

---

# TØKK

**Vit takka hjartaliga fyri tær vøkru heilsanir, sum vit fingu, tá ið handilin "Seytjan" lat upp**

*Vinarliga*

**Ragna og Elsba**

Seytjan
Tórshavn • Tel. 311305

Sosialurin 341800

---

# Stevningsmaður

Eitt starv sum stevningsmaður fyri Norðoyggjar er leyst at søkja frá 1. august 2005.

Løn og setanarviðurskifti eru sambært kunngerð nr. 255 frá Justitsministeriet frá 11. apríl 2005.

Umsóknir skulu vera dómaraskrivstovuni í hendi í seinasta lagi 5. juni 2005.

**Sorinskrivarin í Føroyum**
tann 6. mai 2005

---

# Útbjóðing

Vegna Fuglafjarða Kommunu verður við hesum arbeiðið í sambandi við gerð av útstykking á Kambsdali, boðið út í almenna lisitatión.

Arbeiðið fevnir í stuttum um gerð av einum 40 m. longum vegi, 600 $m^2$ felagsøki og byggibúning av 8 grundstykkjum.

Lisitatiónin verður á kommunuskrivstovuni í Fuglafirði fríggjadagin 20. mai 2005 kl. 13.30.

Útbjóðingartilfarið kann bíleggjast til í seinasta lagi fríggjadagin 13. mai kl. 10.00 við at gjalda kr. 5000,- í veðhaldi á konto nr. 6460-1657404 í Føroya Banka.

Veðhaldið verður afturgoldið, um útbjóðingartilfarið verður aftursent í seinasta lagi eina viku eftir lisitatiónina.

**sp/f Teknistovan**
v. Jens Kl. Jacobsen og Henning Olsen
ráðg. Byggifrøðingar
FO- 510 Gøta
tel: 44 21 05 · fax: 44 21 07
email: klement@post.olivant.fo

---

# Handilslærlingur

Vit sóknast eftir lærlingi til HVS deildina hjá P/F Mariu Poulsen, Smyrilsvegur 8.

Vit kunnu bjóða eitt spennandi yrki, við dagligum avbjóðingum og góðum arbeiðsumhvørvi.

FHS ella HH er ein treyt fyri at byrja sum lærlingur í handilsvinnuni.

Vit vænta at tú ert røsk/raskur, fyrikomandi og von/vanur við at fáast við fólk. Harafturat er tað ein fyrimunur um tú hevur aðrar royndir ella útbúgvingar innan handilsvinnuna, men hetta er ikki ein treyt.

Seinasta freist at senda inn umsókn við prógvum er, fríggjadagin 10. juni 2005.

Eru spurningar eru tygum altíð vælkomin at ringja tlf. 312000.

**pf Maria Poulsen & Co.**
Box 182
FO-110 Tórshavn

---

# Adressur í Vestmanna

Sambært § 7 í løgtingslóg nr. 17 frá 6. mars 2002 um adressur, er adressuskráin fyri Vestmanna góðkend.

Skráin er almenn og tøk á www.matrikul.fo.

**Landsadressuskráin**
Boks 327
Tlf. 357900 - Faz 357901
FO-110 Tórshavn
www.matrikul.fo - post@matrikul.fo

---

## Starvsfólk

Vit sóknast eftir handverkara, ella arbeiðsmanni, M/K, at arbeiða við at lidugt viðgera vindeygu og hurðar. At byrja skjótast tilber.

**Vit bjóða:**
- eitt spennandi starv
- tryggar arbeiðsumstøður
- gott arbeiðsumhvørvi

**Vit vænta av tær:**
- at tú ert ágrítin og nærlagdur
- at tú kanst arbeiða sjálvstøðugt og hevur góð evni at tilrættaleggja arbeiði
- at tú ert fyrikomandi og álitandi

**Løn:**
Løn verður sambært avtalu.

Nærri fæst at vita við at venda sær til Fróða Hansen, tel. 22 36 56 ella Dánjal Paula Poulsen, tel. 21 27 89

**Vatnsoyra Snikkaravirki pf.**

---

## Hús í Ovaru Gøtu í Hoyvík



Hesi frálíku húsini í Ovaru Gøtu 46, Hoyvík, eru til sølu um hóskandi boð fæst.



Húsini eru í einari hædd fult innrættað við:
stovu og køki, 5 kømur, baðirúm og bryggers.
Loftið er óinnrættað.
Húsini sum eru bygd í 1999 og eru til víddar 157 $m^2$.
Grundstykkið: 478 $m^2$.

*Nærri fæst at vita við at ringja til:*

**Demmus Hentze**
*landsrættarsakførari*

**Turið Debes Hentze**
*advokatur og mediator m.m.c.r.*

Bringsnagøta 23, Tórshavn - tlf. 311460

Sosialurin